## Farmaskip sakk

Tað eydnaðist danska farmaskipinum Nord Explorer at bjarga allari manningini, tá eitt týskt farmaskip brádliga sakk úti fyri strondini í vesturafrikanska landinum Gabon fríggjadagin. Tað var tann týska bjargingartænastan, sum boðaði frá, at skipið var um at søkka, og skip í umráðnum fingu boð um at fara manningini til hjálpar. Nord Explorer, sum reiðaríið Norden eigur, var fyrsta skip á staðið og tók teir 13 menninar av tí týska skipinum. Stutt eftir at manningin var bjargað, sakk tað týska skipið á umleið 1.200 favna dýpi, skrivar Ritzau. Einki verður sagt um, hví tað týska skipið sakk.



## Gamalt armband

Í 1944 varð amerikanski flogskiparin Jack Harold Glenn skotin niður í flogfari sínum uppi yvir Týsklandi. Nakrir týskarar sóu flogfarið detta niður, og tey fingu flogskiparan út úr vrakinum og jarðaðu hann. Millum teirra, sum jarðaðu Jack Harold Glenn, var ein 16 ára gamal drongur. Hann tók armbandið, sum flogskiparin hevði um annan skøvningin, og goymdi tað við hús. Við hjálp frá týska herinum hevur hann nú funnið systir flogskiparans og latið henni armbandi hjá bróðurinum. Systurin er fegin, men hevur gjørt av at lata einum savni í Twxas armbandið hjá bróðurinum.



*Útvarpsstøð í Onglandi hevur eftir øllum at døma sýnt Faroe 5 áhuga. Framtíðin sær bjørt út, og hetta er bara byrjanin, sigur Raghild Dam*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Faroe 5 vekir ans uttanlands

**Føroysku genturnar í Faroe 5 kunnu, um væl vil til, skjótt røkka út um landoddarnar við tónleiki teirra. Útvarpsstøð í Onglandi hevur víst bólkinum áhuga**

HVONN LIVE
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Ein útvarpsstøð í Onglandi hevur sett seg í samband við føroyska gentubólkin Faroe 5, og er áhugað í at hoyra meira frá bólkinum. Útvarpsstøðin hevur biðið um at fáa nøkur løg sendandi, og Faroe5 eru farnar í holt við at taka nøkur nýggj løg upp. Hetta er uttan iva eitt stórt lop hjá unga føroyska gentubólkinum. Tað greiddi Ragnhild Dam, ein av teimum fimm í gentubólkinum, frá á Hvonn Live leygarkvøldið.

Ragnhild Dam greiddi annars frá lívinum sum ung poppstjørna í Føroyum.

- Tað fer við nógvari tíð, og krevur nógva venjing, so mann hevur ikki so góða tíð til vinirnar. Men tað er tað, sum skal til, greiðir Ragnhild Dam frá.

Í summar var hon liðug á studentaskúla, og hevur hon sostatt gingið á triðja ári í student, samstundis sum hon hevur verið nógv upptikin av tónleikinum. Men tónleikurin hevði eftir øllum at døma ikki darvað skúlagongdini eins nógv, og ein kundi væntað.

### Frá sær sjálvari á palli

Ragnhild Dam hevur í skjótt tvey ár havt hópin av størri og minni framførslum við Faroe 5, og hon greiðir frá, at tað besta við øllum eru tær upplivingar tú fær, og sum tú kann brúka víðari í lívinum.

- Tú kemur ígjøgnum nógv, ið tú annars ikki hevði gjørt, og hetta eru góðar upplivingar, sum eg kann taka við mær gjøgnum lívið, hetta at duga at standa á palli og at tora at traðka fram, segði unga havnadaman á Hvonn Live leygarkvøldið.

Hon greiddi eisini frá, at tað er nakað heilt serligt, tá tú stendur á pallinum.

-Á palli er tað nakað við at fara frá sær sjálvari og bara vera Ragnhild. Hetta er ikki tann sama Ragnhild, sum tú møtir á gøtuni, og nervarnir verða heilt vekk.

Hon greiddi eisini frá, at tær í Faroe 5 javnan verða kendar aftur á gøtuni, men at tað er ikki sum um at tær noyðist at ganga við sólbrillum, og at tað er als ikki nakað negativt.

Framtíðin hjá gentubólkinum er enn bjørt sum nakrantíð, hóast bólkurin skjótt hevur tvey ár á baki. Tað er Ragnhild Dam avgjørd um.

- Hetta er bara byrjanin, sigur hon.

# Rósa eigur sjá

**Hevði Rósa Samuelsen givið grønt ljós fyri at Levi Johannesen kundi halda fram á stovni í Danmark, var einki rokilsi uppstaðið. Avgerðin verður tikin hjá landsstýriskvinnuni og ikki í Almannastovuni, sum Rósa hevur róð uppundir**

POLITIKKUR
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*



*Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna í Almannamálum, eigur sjálv »apuna« sum hon sendi Almannastovuni*

*Savnsmynd*

»Almannastovan eigur apuna«.

»Rósa sissar foreldur«.

» - Vit mugu inn at endurskoða mannagongdirnar. Tað kann ikki góðtakast, at foreldrini bara vera kontaktaði og stutt kunnaði um, at børnini skulu heim.«

Hesar yvirskriftir og endurgevingar er Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna í Almannamálum, uppruni til. Málið, sum tað snýr seg um, er um 17 ára gamla Levi Johannesen, sum fyrr í summar ikki fekk longt stovnsuppihaldið hjá sær í Danmark longri enn til 1. oktober.

Dúgliga hevur Rósa Samuelsen roynt at flutt ábyrgdina yvir á Almannastovuna.

Í grein í Dimmalætting vísir rósa samuelsen á, at Almannaráðið bara játtar tá ung fara av landinum, og at á hvørjum ári koma so nýggjar umsóknir ella umsóknir at endurnýggja.

- Vit hava onga ávirkan á, nær fólk verða tikin heimaftur. Tað er upp til Almannastovuna at gera av nær tað er. Men sjálvandi skal eingin heim, um nøktandi tilboð ikki finst her, sigur landsstýriskvinnan við Dimmalætting fríggjadagin 11. september.

Andsøgn er tó í orðunum

# Ideologiskir politikarar

**At tað tykist sum at tað bert er ruðuleiki og kaos í politiska landsslagnum er helst tí at takka, at Føroyar eru blivnar eitt valdømi. – Ein ideologiskur politikari er keðiligur fyri miðlarnar, og skal tú síggjast, má tú ganga úr takt, sigur Jørgen Niclasen**

HVONN LIVE
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

- Tað hevur helst ávirkað nógv, at Føroyar eru blivnar eitt valdømi. Har eru løgtingslimir, sum duga at síggja, at skulu teir kunna profilera seg, so mugu teir ganga úr takt. Tað heldur Jóannes Eidesgaard, formaður í Javnaðarflokkinum.

Í sendingini Hvonn Live leygarkvøldið varð stórur dentur lagdur á spurningin, um nøkur kós er at hóma í føroyskum politikki, ella talan bert er um kaos og retorikk uttan innihald.

Hesin spurningur varð lagdur fram fyri formonnunum í trimum av teimum stóru flokkunum, Jørgen Niclasen fyri Fólkaflokkin, Jóannes Eidesgaard fyri Javnaðarflokkin og Høgna Hoydal fyri Tjóðveldi.

Jóannes Eidesgaard, sum er tann mest royndi av teimum trimum, slapp at leggja út. Hann helt við, at allar samgongur hava eina kós, sum eftirtíðin so má vísa, um teir hava rokkið kósini, ella um kósin var røtt. Hann helt heldur ikki, at ruðuleikin í politiska landslagnum er verri nú, enn hann hevur verið fyrr.

-Kaos er eitt orð, sum fjølmiðlar og andstøða kunnu lukrera uppá. Men tað er einki óvanligt í at flokkar eru ósamdir sínamillum, bæði millum andstøðu og samgongu, inni í samgongum ella eisini í sama flokki. Tað er ikki verri nú, enn tað hevur verið fyrr, og sitandi samgonga er ikki í kaos, segði Jóannes Eidesgaard.

Høgni Hoydal hinvegin helt, at ruðuleikin hevði ongantíð verið størri enn nú. – Tað er eingin kós, ruðuleiki valdar um alt, og tað eru tilvildarligir rossahandlar, sum avgera hvat verður gjørt, og hvat ikki verður gjørt, segði Høgni Hoydal.

### Mugu ganga úr takt

Flokksformenninir eru at kalla samdir um, at orsøkin til at tað tykist sum, at ruðuleiki valdar er, at Føroyar nú eru eitt valdømi.

Jørgen Niclasen, formaður Fólkafloksins, ásannaði, at tað eru politikarar í Løgtinginum sum mugu vísa, at teir eru til.

- Ein ideologiskur politikari er keðiligur fyri fjøl-